## VIÐMERKINGAR

# Viðvíkjandi bygging av røktarheimi í Vági

**Bodil Finnsson**
**Hanna Ryggshamar**
**Margrith Thomsen**

Undirritaðu vilja gera eina viðmerking til hetta aktuella mál, tí vit halda, at tað er stórur tørvur á einum røktarheimi í sunnari helvt av Suðuroynni.

Ì Vági er eitt eldrabýli til 12 fólk. Hetta eigur Vágs kommuna, og eru tað tí fyrst og fremst vágbingar, ið sleppa inn har at búgva. Eldrabýlið var ætlað til fólk, sum við eitt sindur av hjálp kundu klára seg sjálvi. Men av tí at tørvurin á røktarheimsplássum er stórur, eru tað fleiri røktarkrevjandi búfólk á eldrabýlinum og normeringin av starvsfólki er ikki til at nøkta henda tørv.

Um vit høvdu eitt røktarheim til hesi fólk, hevði pláss verið á eldrabýlinum til fleiri búfólk, sum eru betur fyri.

Í Suðuroynni hava vit annars Ellis og Røktarheimið á Tvøroyri, hetta er longur burtur frá okkara heimliga umhvørvi, og bíðitíðin er sera long at sleppa inn.

Orsakað av hesum umstøðum eru tað nøgv røktarkrevjandi eldri fólk, sum í dag búgva heima. Hetta er ofta tungt fyri tey avvarðandi, tí hetta er arbeiði alt samdøgrið, og hesi avvarðandi hava flest øll eisini eitt arbeiði, sum skal røkjast. So hóast tey fáa heimahjálp, er tað ofta ógvuliga tungt at fáa alt at bera til. Fyri ikki at tosa um tey eldru, sum ongan avvarðandi hava á staðnum, og so tey sum ongan eiga - tey eru ikki so fá.

Hetta er ikki ein virðilig støða fyri okkara eldri, at tey skulu føla seg sum eina byrðu á ellisárum, tað hava tey ikki uppiborið aftaná eitt langt og strævi lív.

Sjálvandi vilja øll verða búgvandi í egnum heimi sum longst, men ert tú óhjálpin, so letur hetta seg ikki altíð gera. Tí skal vera møguligt at velja, tað kanst tú ikki í dag, tí bíðitíðin er so long at sleppa inn á stovn at búgva.

Sjálvt um heimarøktin verður útbygd, so er samdøgrið framvegis 24 tímar fyri tann einstaka, sum hevur tørv á hjálp bæði nátt og dag. Tí vil tað altíð verða brúk fyri røktarheimum. Um spart verður í játtanini til heimarøktina, er eisini skjótt at tænastustøðið lækkar.

Tí skal spurnartekin ikki verða sett við, um vit hava ráð at byggja røktarheim, og hvør skal gjalda. Hetta skulu vit í felag megna.

Fyri bygging av røktarheimum rinda land og kommuna hvør sína helvt av íløguni, meðan landi einsamalt rindar fyri raksturin.

Í Suðuroynni er onki tilboð til minnisveik, so um ein deild til minnisveik verður gjørd á røktarheiminum, varð eisini hetta átrokandi mál loyst.

Okkara áheitan á politikkarnar er at finna eina loysn á hesum málið ongantíð ov skjótt, so byrjað kann verða at byggja.

## Tøkk

Í samband við kommunuvalið í Fuglafjarðar kommunu tann 9. november, vilja vit, ið valdir vóru á lista A og lista B, veita okkara veljarum eina hjartans tøkk fyri tann dygga stuðul tit veitti okkum. Eisini vilja vit takka øllum hinum valevnunum á lista A og B fyri at tey vildu stilla upp.

Teimum 50 stillarunum takka vit fyri álitið tit vístu okkum valevnum.

*Blíðar heilsanir*

**Listi A - Dánjal Vang, Eyðun á Lakjuni og Jann Toftegaard**
**Listi B - Sigurð S. Simonsen og Jón Nolsøe Olsen**

ISS

SØKT VERÐUR EFTIR FULLTÍÐARFÓLKI TIL REINGERÐING FRÁ MÁNADEGI TIL FRÍGGJADAG

Vit søkja eftir einum vaskifólki til fiskaídnaðin í Tórshavn.
Arbeiðstíðin er uml. 40 tímar um vikuna, frá kl. 19.00 til 05.00 mánadag til fríggjadag.

Løn sambært galdandi sáttmála, uml. 24.000 + frítíðarpening.

TREYTIR:
· At tú ert fyrikomandi
· At tú ert røkin
· At tú ert arbeiðssamur / arbeiðssom
· At tú hevur kunnleika til reingerðing innan fiskivinnuna

Upplæring fært tú frá okkum.

Er hetta nakað fyri teg, ella ynskir tú fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum:

Jens-Ole Næsborg, deildarleiðari
gerandis dagar millum kl.13.00 - 17.00
á tel 21 88 84

ISS Føroyar · Tinghúsvegur 14, 4 hædd · FO-100 Tórshavn
www.iss.dk

Gávan til veggin




3 vakrar plakatir í litum
við myndum av vælumtóktu "Rasmus Klippunum" úr gomlu Havnini: "Gongin", "Kielerkanalin" og "Skansabrekkan"
3 stk. fyri bara 175,-

Verða latnar í røri - klárt at senda innan- ella uttanlands

Sølustað: Móttøkan á Hotel Hafnia
Att: Johan M. Restorff